## »Andlitið« hjá WTA

Danska tennisstjørnan, Caroline Wozniacki, hevur ikki bara royndir frá síni ítróttargrein, men hevur eisini roynt seg sum modell. Nú fær 19 ára gamla Wozniacki møguleika at gera bæði í senn, tí hon hevur júst verið í London og tikið myndir, sum skulu brúkast til alt tíðindatilfarið hjá tennisfelagsskapinum, WTA, hetta komandi kappingarárið.



## Endiliga bragdaði

Tilsamans 15 ferðir á rað var tað ikki eydnast spanska tennisspælaran, Fernando Verdasco, at vinna á einum spælara, sum er millum 10 teir bestu á heimsstyrkilistanum. Men í gjár bragdaði endiliga hjá spaniólanum, sum er nummar 11 í heiminum, tá hann vann 3-6, 6-4 og 6-4 á heimsins nummar sjey, Andy Roddick, í einari ATP-finalu í San Jose í Kalifornia.



Hóast tað var tungt leygardagin, so eru hyggjuráðini hjá Josef og Kyndli nú at reisa seg og seta fokus á FM-finalurnar, har Kyndil væl kann gerast annar parturin

# Ikki nóg kaldir

### Josef Abrahamsen helt eftir dystin, at hann og liðfelagarnir ikki vóru nóg neyvir í avgerandi løtunum




Jákup Mørk

Eftir eina trupla byrjan, at har Neistin alt fyri eitt slapp avstað, setti Kyndil seg meira og meira á finaludystin, tá hesin varð spældur leygardagin.

Men tað eydnaðist ikki Kyndli veruliga at fáa takið, og hetta iðraðu teir seg sjálvandi um eftir dystin.

- Vit fara út við einum lítlum indianara í verjuni, og tað riggar á tann hátt, at vit í fleiri umførum ota okkum eitt og tvey mál nærri. Men tá avgerandi løturnar eru, skora vit ikki, meðan teir alla tíðina fáa hesi løttu málini.

-Og so skulu teir eisini vera fegnir um, at Ári fekk tveir daga leikbann. Nú skal eg ikki gera handan málverjan til heimsins besta, men hann hevði fleiri góðar bjargingar, har hann pilkar bóltarnar frá okkum, so hann gjørdi stóran mun, segði Josef Abrahamsen.




Fyrstu 17 árini vann Karl Oddmar Rasmussen tvey gullmerki við besta mansliðnum hjá Neistanum. Men seinastu trý árini eru trý gullmerki komin til høldar

Mynd: Álvur Haraldsen



Heima hjá Hanusi Joensern var húskið heilgarderað, tí við einum soni á hvørjum finaluliði, skuldi talan verða um bæði gull og silvur

Mynd: Álvur Haraldsen

# Fantastisk kensla

### Hanus Joensen átti ein son hjá hvørjum av finaluliðunum, men fyri tað helt hann, at tað var fantastiska stuttligt at hyggja




Jákup Mørk

- Kenslan var góð. Heilt fantastisk. Men eg haldi tó, at tað bleiv ið so stórur munur ov tíðliga í dystinum. Fimm mál á muni í hálvleikinum er øgiliga tungt at vinna aftur, og tað vísti seg eisini at vera ov tungt hjá Kyndli, sum nærkaðist í løtum, men sum ikki heilt megnaði at halda tørn.

- Og tað var spell. Sjálvandi skal annar parturin vinna, men tá tú eigur ein á hvørjum liði, so mást tú eisini hava tunguna mitt í munninum, og tí hevði eg ynskt, at tað var so tætt sum gjørligt millum liðini.

Synirnir hjá tær, Heini og Tummas Pauli, høvdu nakrar nærdystir alt fyri eitt. Hvussu kendist tað?

- Eg haldi, at mamman hevði ein trupulleika við tí, men eg legði ikki so nógv í tað. Men tað hendi tað sjáldsama, at tað var lítlibeiggin, sum varð vístur út fyri at vera ov harðligur móti stórabeiggja. Og tað hevði eg líka sum ikki roknað við, segði Hanus Joensen heldur skemtiliga.

# Gevur hug til meira

### Veteranurin hjá Neistamonnum heldur tað bara økja um hugin, nú hann hevur vunnið fleiri heiðursmerki seinnu árini




Jákup Mørk

Karl Oddmar Rasmussen, ið ofta verður brúktur sum jarnmaður í Neista-verjuni, er elsti spælarin hjá Neistanum, tá sæð verður burtur frá spælandi venjaranum.

Síðani hann í 1990 spældi sín fyrsta dyst á besta liðnum hjá Neistanum, taldi steypaskápið fram til fyrraárið eitt steypa- og eitt FM-heiti, men leygardagin kundi hann triðja árið á rað staðfesta, at gull eisini spyrst burturúr hesum kappingarárinum.

- Hetta er sjálvandi stuttligt. Tað liggur jú onkrastaðni í blóðinum, at tú hevur hug at kappast og at vera við til at fáa nakað at rigga. So sjálvandi er hetta stuttligt. Mín leiklutur hevur so verið at standa til reiðar at koma inn, og hóast eg ikki fekk nakran minutt á vøllinum í dag, so var eg alla tíðina til reiðar, um boð skuldu verið eftir mær.

Vart tú ongan tíð bangin fyri, at sigurin skuldi gleppa tykkum av hondum?

- Nei. Eg haldi, at vit allir trúðu somikið nógv upp á tað, at vit bara høvdu fokus á at vinna. Og eg ivaðist onga løtu í, at liðið fór at røkka á mál í so máta, segði Karl Oddmar Rasmussen eftir sigurin.